# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Áralagið í samgonuni versnar

Áralagið á samgongubátinum tykist bert at versna. Eftir tingsetu við óvanliga nógvum samgonguklandri brestur orrusta á millum tveir av landsins mætastu politikkarum. Løgtingið er illa nokk komið til hús, fyrr enn Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður og nú fólkatingsmaður, loysir av móti samgonguni, serstakliga ímóti fíggjarmálaráðharranum, men kann illa annað enn tulkast sum eisini eitt álop á samgonguleiðsluna ella við øðrum orðum á sjálvan løgmann.

Vit hava áður her víst á, at tað er óheppið, at samgonguleiðarar koma við dómadagsrøðum uttan samstundis at vísa á ítøkiligar gongdar leiðir burtur úr tí fíggjarliga og búskaparliga óførinum. Tað tykist, sum skulu fólk fyrst ræðast fyri síðan at góðtaka tey hørðu tiltøk, sum eftir øllum at døma nú verða smíðað í fíggjarmálaráðnum. Nú er so Edmund Joensen farin hernað móti síni egnu samgongu. Tingið er farið í summarfrí uttan at leggja til rættis tann neyðuga kreppupolitikkin. Álvarsama støðan er eftir hansara tykki ikki viðgjørd nóg væl í samgonguni og samgongan hevur ongan kreppupolitikk. Samgongan er rýmd undan uppvaskinum og hetta kann hann ikki góðtaka, tí letur hann eina veruliga breiðsíðu av móti síni egnu samgongu. Nú má samgonga fara í arbeiðsklæðini og sjóklárt at taka í móti búskapaligu ódnini og ikki seta seg at halda summarfrí. Hetta eru sera hørð orð og annað og meira man liggja aftanfyri hetta sera álop.

Fíggjarmálaráðharrin hevur svarað aftur í fjølmiðlunum, og hann er ikki mjúkur. Edmund veit ikki, hvat hann talar um, og samgongan skal als ikki í arbeiðsklæðini, tí hon er ongantíð farin úr teimum! Her standa so tveir av landsins máttmiklastu politikkarum sum tveir stríðselefantar og berjast í pressuni. Gamalt orð sigur, at tá elefantar berjast, verður grasið leksað niður og merkir hetta, at í slíkum stríði eru tapararnir Palleba og Marsanna. Hetta er eitt margháttligt spæl í eini tíð, hvar fólk dagliga gerast arbeiðsleys, hvar fiskivinnan gongur av skriðuni og flestøll lyklatøl í samfelagnum ganga skeiva vegin.

Fíggjarmálaráðharrin vísir í síni hvøssu viðmerking til Edmund, at tingið sambært nýggju játtanarlógini jú skal koma saman aftur í juni til at viðgera karmarnar fyri 2010, og tá fer samgongan at leggja síni kreppupolitiltøk fyri løgtingið. Hesi tiltøk skulu bæði tálma almennu nýtsluni og virka vinnufremjandi og fáa gongd aftur á tey hjól, sum nú eru um at steðga. Hetta er skilagóð tala, men nógv betri hevði verið, um landsstýrið hevði avdúkað eitt vet av síni nýfunnu keppustrategi, áðrenn tingið fór til hús. Sum vit áður hava víst á her, so tala samgongufólk við fleiri tungum í hesum tíðum: eitt heldur dómadagsrøður, annað ber seg at sum er landskassin á tremur, uppaftur eitt triðja tosar svart, har almenningurin hungrar eftir greiðari talu, greiðum málum og greiðari strategi. Alt hetta er ikki gott fyri álitið og lívsmótið hjá borgarum og vinnulívi. Tíðin er við at ganga undan og í seinasta lagi, tá løgtingið kemur saman í juni má og skal almenningurin fáa at vita, hvussu samgongan ætlar at sigla okkum úr tí vandasjógvi, sum vit nú sigla.

**Sosialurin**

Viðmerking til kjaksending

## - í útvarpinum 11.5.09 og annars til prátið um kvinnur, menn og javnstøðu í heila taki

BERGUN KASS



**Hvørjar kvinnur hava ávirkan, hvussu er tilgongdin við leiðandi kvinnum á arbeiðsmarknaðinum og hvørji er frambrotini?**

Til økið - kvinnuligir leiðarar- kann sigast, at hesir í flestu førum verða settir í starv av manni, sum aloftast fyrst og fremst er stjóri og ábyrgdarhavandi vegna fakligan dugnaskap , og verður tað ivaleyst hesin mannfólkahugburður til kvinnu sum arbeiðsmegi, sum ger av, hvør kvinna eru best egnað sum leiðari.

Ein av munum millum kvinnu og mann sigst vera, at kvinnur eru meira praktisk 'anlagdar' og duga betur at skipa fyri, og haldi eg tað vera her, at menninir ynskja hjálpina, og her at flestu kvinnurnar útfylla síni pláss sum leiðarar á arbeiðsplássum.

Hitt økið, - eisini at vera klókur, kritiskur, reflekterandi, djúpthugsandi, øðrvísi hugsandi, intuitivur, menniskjakennari, umsorganarfullur o.a., sum eisini eyðkennir kvinnuna, og sum er torført at máta sum dygd ella kvalifikatión, hevur ikki serliga raðfesting sum leiðaraeginleiki, tí at menninir/stjórarnir her ikki eru á bylgjulongd við kvinnuna, ikki ynskja mótspælið frá kvinnuni ella heilt einfalt ikki gjøgnumskoða hesar dygdir, og tí ikki duga at meta um, í hvønn mun tær eru týdningarmiklar fyri arbeiðsplássið.

Á henda hátt haldi eg vit fáa ein skeivleika í bólkin 'kvinnur við ávirkan' – ella at tað eru kvinnur, sum møguliga líkjast og 'innorðna' seg monnunum, og starvast út frá tankagongdum, reglum, prinsippum, karmum v.m., sum menn hava stungið út í kortið.

Tí koma klóku kvinnurnar 'til kort', ella tær kvinnur sum vilja tað øðrvísi – hesar síggja ikki uppá tingini eins einfalt og menninir, - eru meira 'nuanceraðar' í tankagongd og trívast ikki í tøttum samstarvi við mannfólkahópin, tí kenslan av at kenna seg einsamalla, kenna seg ikki at sláa ígjøgnum, kenna seg ikki at hava virði o. l., ger arbeiðið innihaldsleyst, eins og tað brýtur niður á - og eldhugan hjá kvinnuni.

Man kann siga, at kynsymiskleikin skapar tankaligu breiddina innan arbeiðsøkini, men júst hesin sami ymiskleikin kann eisini verða sjálv forðanin ella fyritreytin fyri, í hvønn mun kvinnan hevur hug at luttaka sum kvinna í stórum undirtali í arbeiðsbólkum, leiðarabólkum, politiskum bólkum v.m., har arbeiðslandslagið í høvuðsheitum er bygt upp av monnum.

Tí hevur tað týdning, at kvinnurnar, sum veruliga ynskja at hava ávirkan og brenna fyri at gera mun á arbeiðsplássum og í samfelagnum sum heild, styrkja hvørja aðra, duga at 'selja kvinnuboðskapin relaterað til arbeiðsøkið' og lýsa, hvussu hesir eginleikar 'supplera' verandi dygdir, og onkursvegna sum bólkur, 'slær ígjøgnum'.

Man kann kalla tað upplýsing! (So eisini Johan Dahl veit hvørjum hann skal leita eftir).

Sjálvsagt síggi eg her eina ávísa generalisering av kvinnu- og mannligu arbeiðseginleikunum, og tað eru altíð vandar í tí, men sum heild eru gjøgnumgangandi munir, og sum eg ikki haldi sæst aftur í okkara arbeiðsmentan. Kvinnur hava havt ávirkan í eina tíð, men eg síggi ikki stórvegis broytingar til tað betra, hvørki tá tað snýr seg um arbeiðsinnihald og fyriskipan – ikki heldur broytingar tillagaðar ynskiligum nútímans arbeiðs- og lívsshátti.

Vónandi kunnu vit flyta kjak-fokus frá núverandi, um 'hvør skal gera hvat heima', um 'raðfesting av familju og arbeiði', um 'kvinnusjálvskritikk' v.m., til eisini at snúgva seg um hina forðanina…..

- at klóka kvinnan møguliga heldur seg aftur, tí hon ikki verður sædd og ikki fær møguleikan at mennast í mannliga arbeiðslandslagnum – og sum minniluti ikki hevur styrkina at sláa ígjøgnum.

Við vón um framburð!

## Berin fingið heimasíðu

*Tíðindaskriv*

Sjálvhjálparbólkurin Berin hevur fingið heimasíðu, **www.berin.fo**

Endamál Berans er, at geva børnum og ungum, ið hava mist foreldur og ella systkin við deyða, eitt forum, har tey kunnu møtast og práta við javnlík.

Sjálvhjálparbólkurin bleiv stovnaður í 2003. Aldurin fyri luttøku er 8 ár og eldri. Higartil hava uml. 250 børn og ung verið við. Nakrir bólkar hava eisini verið fyri vaksin, ið hava mist børn.

Sjálvhjálparbólkarnir skulu virka fyri, at børnini og tey ungu, sum frálíður, gerast betur før fyri at handfara sorgina yvir mista foreldrið/systkini. Á tann hátt hava tey størri møguleika fyri at fáa eitt gott og innihaldsríkt lív, har tey kunnu mennast og liva við missinum.

Børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin fyri fleiri árum síðani, hava eisini havt gleði av bólkunum.

Børnini og tey ungu møtast aðru hvørja viku. Við serkønari hjálp og vegleiðing, práta tey saman um felags upplivingar, kenslur og tankar.

Berin merkir á donskum lysning, ofta brúkt sum en lysning i skoven, eitt stað, har sólin altíð sleppur framat. Á føroyskum kunnu vit eisini brúka hugtakið berajól, sita á berajólum, uttan verju, nakað sum tey ið mist hava, kenna alt ov væl. Harumframt kann navnið Berin, fáa ein at hugsa um at bera. Lyfta vit í felag, kennist byrðan lættari.

Búmerkið, er ímyndin av lívinum við sínum ljósu og myrku síðum. Tað skal minna okkum á, at sjálvt tá tað sær svartast út, ber til at leita eftir glottum. Og tá ið alt sær ljóst út, er tað tann svarta rípan, sum ger mynstrið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.